## Audi A8 til ES



Danski Audi innflytarin, Skandinavisk Motor Co A/S, hava gjørt avtalu við Finansministeriið, um at 120 silvurgráir Audi A8 limousinir skulu standa klárir til ráðharrarnar at brúka komandi seks mánaðirnar, meðan Danmark hevur formansskapin í ES

*Kelda: Motor Magasinet*

## Lægsta tal í 52 ár



Ikki síðan 1950, hava so fá fólk latið lív í ferðsluni í Danmark, sum í fjør, tá 431 fólk lótu lív í ferðsluni. Hægsta talið var í 1971, tá 1213 fólk lótu lív á donsku vegunum.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Tveir diesel til Stilo



Til Fiat Stilo verða nú tveir nýggir JTD common-rail dieselmotorar at velja í, við ávikavist 80 og 115 hk. Common-rail skipanin bleiv av fyrstan tíð uppfunnin av Fiat, og framleidd av Bosch.

*Kelda: Motor Magasinet*

# VW brandbil til Skálafjarðar Sløkkilið

**Skálafjarðar Sløkkilið hevur fingið ein nýggjan hjálparbil til brandstøðina á Skála. Bilurin er ein VW Transporter Syncro við 102 hk**

BRANDBILUR
*Magnus Gunnarsson*

Skálafjarðar Sløkkilið umfatar hesar kommunurnar á Skálafjørðinum: Nes, Runavíkar, Skála og Sjóvar kommunu. Á Skála hava teir tveir brandbilar, á Strondum ein og í Runavík tveir. Brunaumsjónarmaður fyri økið er Sunnleiv Højgaard í Runavík og varaleiðari fyri økið er Vilhelm Olsen á Skála, ið eisini er leiðari fyri brandstøðina á Skála. Tilsamans eru teir 29 mans. 19. juni lat Bilasølan v. Øssur Johannesen teimum ein nýggjan VW Transporter Syncro, í longru útgávuni.

Ein slíkur hjálparbilur, ið skal vera fyrstur á vanlukkustaðnum, er útgjørdur við øllum tí, ið er neyðugt til at veita neyðugu hjálpina, áðrenn teir størru brandbilarnir náa at koma fram. Tí er eisini neyðugt at bilurin er kvikur og kann koma fram í øllum veðri. Transportarin hjá Skálafjarðar Sløkkiliði trekkjur á øllum 4 hjólunum og hevur ein 2.5 litur TDI 102 hk turbo dieselmotor við beinleiðis innspræning og intercoolara.



*Lars Egemose, sølumaður á Bilasøluni v.Øssur Johannesen, handar her bilin hjá Skálafjarðar Sløkkiliði til Vilhelm Olsen leiðara á brandstøðini á Skála og Ólav Berg sløkkimeistara á Skála*

# Faxe bilar frá Reyni Service




*Ronny í Lon, sølumaður hjá Reyni Service, handar her Faxe sølumonnunum, Sigurjón Einarsson (v.m.) og Rúna Joensen, báðar Toyota Avensis Sportvan bilarnar*

**Fríggjadagin 21. juni, longsta dag, lat Reyni Service tveir Toyota Avensis Sportvan til Faxe deildina hjá P/F Poul Michelsen heilsølu í Havn**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

P/F Poul Michelsen heilsøla yvirtók tann 1.juni í ár Faxe umboðið, ið Eysturoyar Heilsøla hevur havt í eini 30 ár. Faxe deildin er ein sjálvstøðug eind í heilsøluni hjá Poul Michelsen. Leiðari á deildini er Sjúrður Ludvig í Havn. Teir hava keypt tveir Toyota Avensis Sportvan til sølumennirnar Rúna Joensen og Sigurjón Einarsson, ið skulu vitja kundarnar kring landið við bilunum. Faxe bilarnir síggjast, har teir koma við stórum reklamum á síðunum. Bilarnir hava 2.0 D-4D turbo dieselmotorar við commonrail innspræning og 116 hk. Avensis Sportvan verða eins og forgangarin, Toyota Picnic, nógv seldir sum vørubilar.



# Millum tær seinastu av gamla skúlanum



*Her eru nýggju sjúkrasystrarnar. Beinta Krett Áargarð, Hoyvík, Randi Borðoy, Oyrabakki, Connie Christensen, Kollafjørður, Marita Danielsen, Ljósáir, Dorthea Ellingsgaard, Eiði, Vár í Gong, Tórshavn, Jóngerð Guttesen, Tórshavn, Nomi Hansen, Norðskála, Emy Margretha Hjelm, Vágur, Unn Justinussen, Leirvík, Heidi Næs, Hvalba, Helfríð K. Poulsen, Eiði, Elisabeth Samuelsen, Tórshavn, Elaina AnnfinnsdóttirVang, Tórshavn og Mona Ziskason Viðoy, Hoyvík*



*Vælnøgd sjúkrasystir og familjan. Helfríð av Eiðisaman við soninum Jákup og manninum Helga*

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*
*Jan Müller, myndir*

Seinasta fríggjadagur var ein stórur dagur hjá 15 nýklæktum sjúkrasystrum, sum fingu prógvini handað frá Sjúkrasystraskúla Føroya. Og tær hava nakað at gleða seg til, tí útbúgvingin sum tær hava valt, gevur atgongd til ein arbeiðsmarknað, har stórur tørvur er á sjúkrasystrum.

- Allar sum hava søkt hava fingið arbeiði. Tær hava fingið starv innan sjúkrahúsverkið, heimarøktina og ellisheimini, sigur Bergjjot Ihlen, stjóri á Sjúkrasystraskúla Føroya.

- Tað er nógv brúk fyri sjúkrasystrum í dag, sigur hon.

Vanliga, so verður ein nýggjur flokkur tikin inn um árið og hesin byrjar í september, men soleiðis verður ikki í ár. Útbúgvingin skal broytast og beint undan valinum varð uppskot lagt fyri tingið um hesa broyting. Uppskotið er ikki liðugt viðgjørt enn, men kemur fyri aftur í ólavsøkutingsetuni. Næsti flokkurin byrjar í februar, sigur Bergliot Ihlen, stjóri.

Útbúgvingin skal broytast til eina bachelorútbúgving og skal verða knýtt at Fróðskaparsetrinum.

team85
Shetland Cruise 2002 summarið
www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00
Farið verður av Havnini mánadag og komið verður aftur mikudag



Gisting á hotelli
(í lágárstíð) úr einans ... 1.149,- fyri hvønn



Gisting á vallaraheimi
(í lágárstíð) úr einans ... 746,- fyri hvønn



Privat gisting
(í lágárstíð) úr einans ... 878,- fyri hvønn

Nógvir handlar hava opið týsdag til kl. 18.30

Á farstøðini í Lerwick er møguleiki fyri at lata inn viðføri til varðveitslu til fráferðina hjá Norrönu



Ring og hoyr nærri !
e-mail: booking@smyril-line.fo